Gott høvi at leggja av við

**Legg-av pakkanum**




**ið fæst »Altjóða roykfría dagin« fríggjadagin tann 31. mai á Tjaldurs Apotek Tórshavn, Tjaldurs Apotek Runavík, Norðoya Apoteki og Suðuroyar Apoteki.**

Pakkin kostar 50,- kr., og fæst á øllum apotekum frá 26. mai. Endamálið við tiltakinum er at geva roykjarum eitt gott høvi at leggja av at roykja.

Við at lata lepan inn á eitt av apotekunum fært tú ein LEGG-AV PAKKA. Apotekið hevur pakkað pakkar til útlýggjan hendan dagin til tey, ið hava í hyggju at leggja av at roykja Altjóða roykfría dagin, fríggjadagin 31. mai.

Í legg-av pakkanum eru fleiri ymiskir nikotin tilbúningar.

***Apoteksverk Føroya***

*Vinarliga fyllið teigin út, so vit fáa mett um týdningin av tiltakinum.*
*Lat lepan inn á apotekið, og fá ein LEGG-AV PAKKA*

*Navn:*
*Bústaður:*
*Telefonnumar:*


## Tøkk

Hjartans takk fyri ta stóru samkenslu og hjálpsemi, sum vístvar okkum, tá okkara kæra og elskaða kona, mamma, systir, vermóðir og omma

**Vilgerð Astridardóttir**
Tórshavn

lá sjúk, doyði og varð jarðað.

Tøkk øll tit, sum vóru um hana, og tit sum á einhvønn hátt hjálptu til, meðan hon var sjúk.
Tit vóru ein stór hjálp í neyðini.

Tøkk til tykkum øll, sum á ymiskan hátt hjálptu til við jarðarferðina.
Tøkk til starvsfólkið á B6 og á oknologiskudeild á Landssjúkrahúsinum, tøkk til Lágargarð.

Tøkk fyri troystarrík orð og til tykkum mongu, sum ringdu og luttóku í stóru sorg og sakni okkara.

Tøkk øll tit mongu, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað her á fold.

Tøkk fyri kransar, blómur og peningagávur til Spedalskheitsmissiónina.

Hjartans tøkk øll somul

*Familjunnar vegna*
**Andrias og Manijeh**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu tá okkara elskaða dóttir, systir, svigarinda og fastir

**Ann Thomsen**
Hvidovre

andaðist og varð jarðað á føroyska partinum á Vestre Kirkegård.

Tøkk fyri kransar og blómur og til tykkum, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað her á fold.
Ein serlig tøkk til tykkum, sum komu úr Føroyum og øllum, sum skrivaðu og ringdu og á annan hátt stuðlaðu okkum undir hennara tungu sjúkralegu.
Hjartans tøkk øll somul.

**Hilda, Daniel Jacob, Pauli, Bjørg og Daniel Eyðun**


**An international study programme at the Academy of Higher Education is only a click away!**

- Chemical and Biotechnical Analyst
- Building Technician
- Multimedia Designer

Look it up at www.ats.dk for further information

Academy of Higher Education
Aarhus Technical College
Denmark




Árni Dam, russiskur konsul:

# – Stórur heiður hjá okkum øllum

**Hósdagin varð Àrni Dam alment tilnevndur russiskur konsul**

KONSUL
*Heri á Rógvi*

– Hetta er ein stórur heiður hjá øllum føroyingum.

Soleiðis sigur nýliga útnevndi russiski konsulin í Føroyum, Árni Dam.

Skipað var fyri einari móttøku á Hotel Hafnia seinnapartin hósdagin í sambandi við almennu útnevningina av Árna Dam sum russiskan heiðurskonsul.

Fitt av fólki stakk inn á gólvið fyri at heilsa nýggja konsulinum. Teirra millum vóur eisini fleiri russarar, sum búgva í Føroyum.

Árni Dam fekk tey almennu pappírini handaði frá Vladimir Ulasevich, sum er virkandi russiskur sendiharri í Danmark.

*Virkandi russiski sendiharrin í Danmark Vladimir Ulasevich handaði Árna Dam, t.v., pappírini upp á, at hann nú er russisku konsul.*

*Mynd: Heri á Rógvi*

Í hesum starvi sum manningarstjóri á agency deildini hjá Skipafelagnum hevur Árni Dam havt nógv samskifti við russar, og hann sigur sjálvur, at hann so gott sum hevur verið virkað sum konsul ella sum umboðsmaður.

– Eg rokni tí ikki við, at tað verða tær nógvu broytingar í mínum dagliga arbeiði. Tað verða kanska fleiri almennar uppgávur, men sum sagt, eg rokni ikki við tí stóra arbeiðinum afturat, sigur Árni Dam.

Sjálvur er hann eisini ógvuliga fegin um heiðurin. Árni Dam hevur knapt 30 ára royndir við russum, soleiðis at hann hevur hollan kunnleika til russisk viðurskifti. Àrni sigur, at hann roknar við, at millum tíggju og tjúgu russar búgva í Føroyum. Umframt hetta hava Føroyar tætt handilssamstarv við russar.

Spurdur, hvussu tað ber til, at russar hava bíðað inntil nú við at tilnevna ein konsul í Føroyum, sigur Árni, at danir ikki hava ynskt hetta áður, men nú havi givið loyvi til russiskan konsul í Grønlandi og í Føroyum.

### Menna samstarv

Vladimir Ulasevich er komin til Føroya sum virkandi sendimaður í Danmark fyri Russland í ørindunum at tilnevnda og vera hjástaddur, nú Árni Dam er vorðin russiskur konsul.

Vladimir Ulasevich greiðir frá, at uppgávan hjá russiksan konsulinum í Føroyum fyrst og fresmst at skapa góður umstøður fyri russarar í Føroyum.

– Vit vilja eisini menna samstarvið við Føroyar, og vit meta tað sum eitt týdningarmikið stig at útnevnda ein konsul í Føroyum, sigur Vladimir Ulasevich.

Sosialurin ynskir Árna Dam til lukku við heiðurinum.

*Heilt fitt av fólki stak inn á gólvið á móttøkuni. Her er tað Jacob Vestergaard, fiskimálaráðharri, sum tosar við russikan konsulin.*


SKEIÐSTOVAN KVASIR FARODANE

**KVASIR bjóðar**

**Kom og fá tær Teldukoyrikort á KVASIR**

Vegna stóra undirtøku byrjar ein nýggj teldukoyrikortrøð á KVASIR. Kom á skeið **mikudagar seinnapart kl. 13:30 – 16:30** í hugnaliga umhvørvinum á KVASIR.

Kostnaðurin er kr. 9.900 - uttan prøvtøkur - um tú teknar teg til allar sjey partarnar í teldukoyrikortinum.

Nærri lýsing um ymisku partarnar (modulini) finnir tú á heimasíðu okkara www.kvasir.fo. Tú ert eisini vælkomin at ringja til okkara á 320 204.

Tel **320 204**
**www.kvasir.fo**

**Hátrýstvaskarin!**

**Ring 42 31 11**